**Um greina-skrivaran:**

Janus á Ryggi er í løtuni staddur í USA, har hann lesur stjórnmálafrøði á California State University í San Diego.

Amerikanska forsetavalið:

# Rasa, átrúnaður og yngra ættarliðið



*Tey bæði forsetavalevnini, republikanarin John McCain, og demokraturin Barack Obama*

FORSETAVAL
*Janus á Ryggi*
*janusryggi@yahoo.com*

Skjótt hevur USA ein nýggjan forseta, og viðkomandi er at spyrja, hvørji viðurskifti kunnu hava ávirkan á valúrslitið í dag. Búskaparliga støðan í landinum og vantandi undirtøkan fyri sitandi republikanska forsetinum George W. Bush, hava verið nevndar sum orsøkir til, at demokratiska forsetavalevnið, Barack Obama, kann vinna valið. Fleiri meiningarkanningar hava víst, at ein meiriluti av veljarum halda, at Barack Obama er betri førur fyri at loysa búskaparkreppuna. Seint í oktober mánaða varð hildin ein ráðstevna, ið sonevndi Brookings stovnurin fyriskipaði. Endamálið við ráðstevnuni var, at greina hvørji demografisk viðurskifti kunnu hava størstu ávirkan á forsetavalið. Talan var serstakliga um rasu, átrúnað og yngra ættarliðið av møguligum veljarum. Týðandi er at hava í huga, at ein stórur partur av teimum ið hava valrætt luttaka ikki á valinum, við seinasta val var talan um umleið 54 prosent. Ábendingar eru tó um, at luttakan á hesum valinum verður metstór.

## Etniskir minnilutar

Forsetavalevnini bæði eru á mangan hátt mótsetningar. Fleiri hava víst á, at veljarar ikki bert lurta eftir søgdum orðum og grundgevingum tá teir skulu taka støðu, men eisini tilvitað ella ótilvitað leggja dent á til dømis persónsmensku og stíl hjá valevnunum. Barack Obama og John McCain eru tvey valevni við stórum aldursmuni og ymsum húðarliti. Av somu orsøk hava fleiri spurt hvørja ávirkan etniskir minnilutar kunnu hava á valið. Í USA eru um 14 prosent latín amerikanarar, 13 prosent amerikanarar av afrikonskum uppruna og umleið 5 prosent asiatar. Niðurstøðan á ráðstevnuni sum Brookings stovnurin skipaði fyri var, at í roynd og veru er tað bert ein lítil partur av latín amerikanarum og asiatum, ið kunnu atkvøða, tí at hesi ikki hava amerikanskan ríkisborgaraskap, umframt at fleiri eru ov ung til at atkvøða. Hesir minnilutar kunnu tó hava avgerandi týdning fyri úrslitið í statum, har teir eru vaksandi. Ein meiriluti tykist stuðla demokratunum, helst orsaka av búskaparstøðuni og lyftunum um broyting. Tølini vísa, at amerikanarar av afrikonskum uppruna í stóran mun stuðla Obama, hesin bólkurin kann gera stóran mun í sonenvdu sveiggj statunum, har javnt er millum partarnar.

## Átrúnaður

Seinastu tíðina hevur ikki verið nógv tosa um sonevndar átrúnaðarligar og etiskar spurningar í valstríðnum. Niðurstøðan á Brookings ráðstevnuni var tó, at átrúnaðarlig viðurskifti framvegis hava stóra ávirkan. Eitt nú vóru sekularisering, kristna evangeliska røslan átrúnaðarligt fjølbroytni nevnt sum týðandi viðleikarar. Sekularisman ger um seg í amerikanska samfelagnum og mong hava einki alment tilknýti til etableraðan átrúnað. Harumframt elvir immigratiónin til, at átrúnaðarliga landslagið gerst meiri fjølbroytt. Hóast hetta hevur kristna evangeliska rørslan framvegis stóra ávirkan og kann hava ávirkan á úrslitið. Niðurstøðan á Brookings ráðstevnuni var, at hvítir katólskir veljarar kunnu flyta seg mest, ímeðan evangelisku veljararnir støðufast velja republikanararnar. Ábendingar eru um, at fleiri katolikkar førka seg yvir á demokratisku síðuna, ein orsøk til hetta kann vera, at katólski átrúnaðurin hevur eina sterka sosiala traditión, ið leggur dent á, at hjálpa teimum, ið eru komin illa fyri. Sostatt kann búskaparstøðan elva til, at fleiri katólskir veljarar velja demokratarnar, av tí at hesir tosa meiri um sosialar ábøtur.

## Aldur

Eygleiðarar vænta, at eitt størri lutfall av ungum fara á val hesaferð enn vanligt er. Veljarakanningar hava víst, at Barack Obama hevur stóra undirtøku hjá ungum millum 18 og 29. Ein veljarakanning vísti, at 63 prosent av hesum sameina seg við demokratarnar og bert umleið 33 prosent við republikanararnar. Orsøkirnar kunnu vera fleiri. Brookings ráðstevnan vísti eitt nú á, at sitandi forsetin hevur lítla undirtøku og hevur gjørt republikanska boðskapin torføran at selja, umframt at ung um heild eru meiri broytingarsinnaði enn eldra ættarliðið.

# Valevni í nýggjari kommunu hitta veljaran

**Valevnini í nýstovnaðu Eysturkommunu fara at hitta veljararnar á almennum fundi mikukvøldið**

VALFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í sambandi við valið til kommunustýrini kring landið um eina viku, verður nú almennur fundur í nýggju Eysturkommunu, har veljarin fær høvi at hitta valevnini.

Fundurin verður í bygdarhúsinum í Leirvík mikukvøldið klokkan 20.

Í kommununi, sum fevnir um Leirvík og Gøtu, hava 43 valevni bjóðað seg fram.

Fyri fyrstu ferð verður stillað upp á politiskum listum og tað eru teir fýra stóru flokkarnir, A,B,C og E, sum bjóða seg fram.

Á fundinum fær hvør flokkur fyrst 10 minuttir til eina framløgu og síðani fimm minuttir afturat.

Eftir framløgurnar fær fundarfólkið 40 minuttir at spyrja valevnini um ymisk mál og at enda fáa og flokkarnir so fimm minuttir í part afturat til at taka samanum.

